


www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 10 - 2011

# Statoil stórkeyp í USA

Statoil kunngjørdi í gjár, at tað hevur keypt felagið Brigham Exploration Company og fær við keypinum eitt 1.500 ferkilometrar stórt skiferoljuøki í amerikonsku statunum Norður Dakota og Montana. Við keypinum verður norska felagið operatørur í skiferoljuøkjunum Bakken og Three Forks, sum sambært Stavanger Aftenblad eru millum tey størstu av sínum slagi í USA. Frammanundan eigur Statoil partar av skiferoljuøkjunum Marcellus og Eagle Ford. Í fráboðanini til virðisbrævamarknaðin í Oslo sigur Statoil, at handilin í USA hevur kostað felagnum umleið 4,4 milliardir dollarar. Helge Lund, aðalstjóri, sigur í fráboðanini til virðisbrævamarknaðin, at felagið hevur tikið eitt týðandi stig við at keypa sær rættindini í Montana og Norður Dakota, og at felagið nú er vorðið eitt av teimum størstu, tá tað snýr seg um at útvinna olju uppi á landi í USA.